Kappingareftirlitið

Heygum Petersen Thomsen
Bøgøta 16
100 Tórshavn

Att: Djóni Thomassen, adv,

Tórshavn, tann 8. apríl 2026

**Viðv.: máls nr. 26/00149 – Samanlegging – P/f Varðin fær einaræði á P/f Grant**

Kappingareftirlitið hevur tann 20. mars 2026 móttikið eina einfalda fráboðan um yvirtøku hjá P/f Varðanum av P/f Grant. Eftir §17, stk. 5 í kappingarlógini byrja freistin í §18, stk. 1 í kappingarlógini, tá ið Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggjaða fráboðan og skjalprógv fyri rindaðum ómaksgjaldi. Freistin byrjaði tann 20. mars 2026.

Yvirtøkan fer fram við, at P/f Varðin fær beinleiðis einaræði á P/f Grant. Hetta verður gjørt við, at verandi partapeningur í P/f Grant verður niðurskrivaður til null, og at nýggjur partapeningur síðani verður skotin inn og teknaður av P/f Varðanum. Eftir at partapeningurin er teknaður fer P/f Varðin at eiga 100% av partapeninginum í P/f Grant og fær fult ræði á felagnum.

P/f Varðin hevur virksemi innan fiskivinnu, herundir rakstur av nótaskipum og trolarum, framleiðslu av fiski og annað virksemi í hesum sambandi.

P/f Grant hevur virksemi innan framleiðslu og sølu av vindeygum og hurðum, umframt handverkaratænastu knýtt at hesum virksemi.

Viðkomandi marknaður er marknaðurin í Føroyum fyri framleiðslu og sølu av vindeygum og hurðum, umframt handverkaratænastu knýtt at hesum virksemi. Metingin hjá pørtunum er, at samanleggingin ikki elvir til munandi forðing fyri virknari kapping, m.a. tí virksemið hjá pørtunum er á ymiskum marknaðum uttan beinleiðis yvirlap.

Talan er um eina transaktión, sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, tí ræðisbroyting fer fram. Umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í §14, stk. 1 í kappingarlógini.

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí at transaktiónin fellur undir §3, stk. 1, nr. 2 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar.

§3, stk. 1, nr. 2 fevnir um støður, har ein fyritøka fær fult ræði á eini aðrari fyritøku, sum hon frammanundan hevur ræði á saman við øðrum.

Kappingareftirlitið

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar hevur Kappingareftirlitið tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. §15, stk. 7 í kappingarlógini, vísandi til §15, stk. 2 í kappingarlógini um, at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Góðkenningin er treytað av, at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sbrt. §20 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
Fulltrúi